3 frá 3'aranum

FLØGUUMMÆLI

DAGFINN OLSEN

The smashing Pumpkins

The machines of God

Ein sjarmerandi fløga. Fyri at siga tað soleiðis.

Tá ein ikki kennir so øgiliga nógv til bólkin, uttan tað, ið hevur verið at hoyrt í vørpunum, so er hetta ein klár niðurstøða.

Talan er um tónleik í harðara endanum. Av slagnum, ið fær mammur og pápar at banka á dyrnar hjá ungu børnum sínum, um tey handan læstar dyr seta ov hart frá.

Men av gjørt dugnaligir tónleikarar. Og skal tað vera hetta slagið av tónleiki, so er hetta ein fløga, ið avgjørt er verd at lurta eftir. Ein harður guitari, skitin, sum eg veit ikki hvat, ljómar frammaliga í ljóðmyndini. Hetta merkir sjálvsagt, at talan skal ikki vera um lurtarar, ið koma troyttir heim frá arbeiði. Helst er heldur talan um skúlafrískar ungdómar, ið taka hetta til sín.

Men avgjørt ein sjarmerandi fløga. Orðið kemur til hugs, tí fløguhúsin er ein sera fín og hugnalig eftirger av gomlum pappíri, við (kongaligum) segli á og so framvegis. Sum var talan um dokument frá 1700 ella 1800 talnum.

Heilt OK.

M2M

Shades of Purple

Á hesi lillalittu M2M fløgu hitta vit tær báðar Marion og Marit. Giti, at navnið á bólkinum kemur av hesum.

Hevur ein tíð, hegni og hug, so er at seta hesa fløguna í fløguopið á telduni, tí so fær ein tilboð um at skráseta alt millum himmal og jørð í telduni, so ein kann spæla eitt sjónbandalag. (Soleiðs eitur tað nú neyvan, tá talan er um teldu, tí bond eru yt í hesum digitalu tíðum.)

Men fløgan kann eisini væl nýtast bert til oyruni, tí her er talan um tvær, ið duga at syngja. Og mín sann eisini skriva.

Jú, her er tónleikur, ið flýtur sum hunangur inn ígjøgnum oyragangirnar og nakað situr klistrað eftir. Søtt. Men gott. Soleiðis er við hunangi.

Fínpussaður diddupoppur. Gamaní. Men her tykist at verða góðska undir øllum sukrinum. Her er ikki bert talan um vánaligan, søtan kost. Tað tykist, sum er styril í.

Kundi hugsa mær, at hetta er nakað, sum klistrar á hittlistum kring heimin.

Avgjørt ein fløga, ið er verd at seta í spælaran. Hon skelkar í hvussu er ongan

AC/DC

Stiff upper lipp

Gløggi lesarin sigur kanska, at ummælarar eru gamlar súrar rottur, ið halda seg vita.

Ummælarin sigur bara: Yes! Yes, yes yes!! Tí AC/DC eru still going strong!

OK, hatta við gomlu rottunum er kanka rætt, men súrar? Nei. Ikki tá ein situr við nýggjari AC/DC fløgu í lógvanum. Sum enntá er góð. Enn einaferð.

"Góð" er eitt relativt orð, tá ein tosar um henda bólk. Hann sigur nevninliga summum púrt einki.

Men tað er undrannarvert, at bólkurin megnar at koyra í somu blues/heavy rulluni framvegis, og koyra beint fram, sum var einki hent. Og tað tykist veruliga, sum er einki hent seinastu mongu árini hjá AC/DC. Men tað er júst tað, sum er so ómetaliga fínt. Ein væntar nakað, veit hvat ein fær, og fær júst tað, men ofta betri, enn ein tordi at vóna. Nevnila aftur til røturnar.

Heilt einfalt.

Tað ljóar tað sama í dag, sum fyri 15 ella 20 árum síðani.! Tað er ikki so nógv at siga um AC/DC. Angus Young er framvegis á odda í stuttum buksum og sama slitna guitaranum. Saman við Malcolm Young hevur hann eisini skrivað øll løgini.

Teir gomlu duga enn. Hetta er dygd. Sama kramm hvørja ferð. Eingin fløgupakki svíkur. Kanska, okkara egnu útflytarar eiga at læra av.

Óført.



FÍGGJARMÁLASTÝRIÐ

Starvið sum stjóri á Hagstovu Føroya er leyst at søkja

Sambært lóg nr. 33 frá 7 mai 1991 um Hagstovu Føroya er Hagstovan høvuðsmyndugleiki fyri hagfrøðiligum virksemi í Føroyum.

Hagstova Føroya er ein sjálvstøðugur stovnur í Fíggjarmálastýrinum.

Starvið sum stjóri
Stjórin hevur ábyrgdina av dagligu leiðsluni, menningini og rakstrinum av stovninum.

Høvuðsuppgávur stjórans sambært lógini
Stjórin velur, raðfestir og fyriskipar arbeiðsuppgávurnar á hagstovuni sum eru

1. at savna, viðgera og almannakunngera hagtøl um samfelagsviðurskifti
2. at kunna átaka sær at savna, viðgera og almannakunngera hagtøl fyri kommunur, feløg, fyritøkur o.o.
3. at standa fyri ella vera við til at skipa og gagnnýta hagskráir hjá almennum myndugleikum, ið
4. verða nýttar í almennu fyrisitingini og í vinnuni, og sum kunnu nýtast til
5. hagfrøðiligt endamál
6. at kunna veita stuðul viðvíkjandi hagtølum til nevndararbeiði o.t.
7. at kunna gera hagfrøðiligar greiningar og forsagnir
8. hava altjóða hagtalssamstarv undir hond,
9. og annars standa fyri at útvega landsfyrisitingini og lóggávuvaldinum hagtøl.

Førleikakrøv
Prógv frá lærdum háskúla, cand. polit., cand oecon. ella líknandi.

Umsøkjarar eiga at vera førir fyri at orða seg væl bæði skrivliga og munnliga. Umráðandi er, at tann, ið settur verður, hevur evni at standa fyri verkætlanum og hevur leiðsluleginleikar. Dentur verður lagdur á eginleikar so sum evni at eggja og menna starvsfólkið, góð samstarvsevni, vilja til at royna nýggj virkisøki og áhuga fyri avbjóðingum.

Setanarviðurskifti
Starvið er tænastumannastarv og er flokkað í 37. lønarflokki eftir avtalu millum Fíggjarmálastýrið og Tænastumannafelag landsins.

Setanarheitið er stjóri, og setanarøkið er Fíggjarmálastýrið og stovnar undir tí umframt løgmansskrivstovuna og hini aðalstýrini.

Fleiri upplýsingar
Fleiri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Petur Alberg Lamhauge, fíggjarmálastjóra, á tlf 352020.

Umsókn
Umsóknir við upplýsingum um útbúgving og royndir, avritum av prógvum og møguligum viðmælum verða at senda til:

Fíggjarmálastýrið
Traðagøta 39
Postrúm 2039
FO-165 Argir.

Umsóknir skulu vera Fíggjarmálastýrinum í hendi í seinasta lagi 3. apríl 2000 kl. 12.00.

Skráseting Føroya hevur í dag skrásett ni›anfyri standandi partafelag:

Skrásetingar-nr. P/F 2966

Navn: P/F Norserv Drelnes
Adressa: c/o Kanalen 1, DK-6700 Esbjerg

Kommuna: Fro›biar Kommuna
Stovningardato: 11.02.2000
Vi›tøkudato: 11.02.2000
Kapitalur: Kr. 500.000,00
Inngjaldingarháttur: : Kontant kr. 500.000,00 til kurs 102.
Stovnarar: Danbor Service A/S, Kanalen 1, DK-6700 Esbjerg og A/S Richard B. Thomsen, 800 Tvøroyri.
Nevnd: Gert Kragelund, Liljevænget 5, Hjerting, DK-6710 Esbjerg (forma›ur), Henrik Thomsen, 800 Tvøroyri og Steen Hansen, Lindelunden 35, Kvaglund Vest, DK-6705 Esbjerg.
Stjórn: Steen Hansen, Lindelunden 35, Kvaglund Vest, DK-6705 Esbjerg.
Tekningarreglur: Felagi› ver›ur tekna› av allari nevndini, av tveimum nevndarlimum saman ella av einum nevndarlimi saman vi› einum stjóra.
Grannsko›ari: : Súni Schwartz Jacobsen, KPMG, Staravegur 17, 100 Tórshavn.
Roknskaparár: 01.01. - 31.12
Fyrsta roknskaparár: 11.02.2000 - 31.12.2000
Endamál: Endamál felagsins er at reka agentur, speditión og flutningsvirksemi og anna› virksemi í hesum sambandi, umframt at stovna eina útger›arhavn í Føroyum.

Skráseting Føroya tann 3. mars 2000

Kristin Balle

NÝTT HÁR!

Nú koma vit aftur á vitjan í Føroyum. Við okkum hava vit snotuligasta úrvalið av hárkollum og parúkkum.
Vit hava einaumboðan av nýggjari japanskari tægr, sum er einastandandi slitsterk, og tískil serstakliga vælegnað til fólk við kropsliga hørðum arbeiði - til dømis fiskimenn, handverkarar og onnur.
Hárluturin hevur ótrúlig evni at halda hársniði, og verður ikki sleipin sum fráliður. Harumframt er hann sera vælegnaður til varandi áseting.
Og júst varandi áseting er seræki okkara. Lagdur verður ein tráður undir húðina, og síðan verður hárluturin fastgjørdur.
Nú vaskar og greiðir tú hárið, sum var tað títt egna. Ein lættur og fittligur máti at endurnýggjað hárið. Sjálvur avger tú alt um lit, snið, bygnað o.s.fr.
Legg til merkis:
Vit eru fremstu útvegarar og serfrøðingar Danmarkar tá umræður øðrvísi hár, so kom innar og hygg at tilfarinum...

HOTEL HAFNIA (Loftið)
Leygard. 11. mars og sunnud. 12, mars
frá kl.14.00 - 19.00

SJÓMANSHEIMIÐ Í KLAKSVÍK
Mánad. 13. mars
kl.12.00 - 18.00

Vinarliga ring og bílegg tíð

Henning Toftild
Alternativt Hår Aps
Budolfi Plads 9 DK-9000 Aalborg
tlf: 98 103211 fax: 98 133622
e-mail: alternativt-haar@alternativt-haar.dk
web: www.alternativt-haar.dk

Heitlufts-aggregat til flest øll endamál

- Refleks oljuovnar til bátin, summarhús o.a.
- Hoyggjturkarar til turkan av græsið - serframleitt til Føroysk viðurskifti!
- Gasovnar
- Hitakanónir
- Avfugtarir

Vit útvega eftir tygara tørvi!

Tosið við okkum!
Kaj Andreasen & Co
Sandvíkarhjalli
Tel. 315600 - Fax 318008

Sosialurin - 311820

Telduskeið á Strondum

Skeið í TEKSTVIÐGERÐ verður á Strondum leygardagarnar 11. og 25. mars kl. 9-16 hvønn dag.

11. mars er skeið fyri nýbyrjarar.

25. mars er skeið fyri tey, ið duga eitt sindur ella vilja halda fram frá fyrra skeiði.

Undirvísingin er í hølunum hjá Neta Telducafeini í bygdarhúsinum á Strondum.

Ymiskir undirvísarar.

Ring tlf. 449104
ella 219700

NETA Telducafe á Strondum

Til sølu

Ford Escort 1,8 Diesel

Lagalig fígging.

Bilfríðkan
Velbastaðvegur • 110-Tórshavn
Tel. 31 73 00 ella 21 73 00
BMW
FIAT

Sosialurin - 311820

Bilur til sølu

Honda Civic 1400, silvurgráur, árg. mai 97, í sera góðum standi til sølu.

Tlf. 218246
ella 441126 eftir kl. 18